# EIN ROYND AT V



**ÁLOP** 40 ára gamli maðurin, sum er skuldsettur fyri at hava stungið varafútan við knívi, segði seg í grundlógarhoyrinum hava roynt allar møguleikar at gera vart við sína misnøgd við Almannastovan. At fara eftir varafútanum var hansara seinastua roynd, men hann ætlaði bara at geva Finn Ougaard ein hvøkk, ikki at drepa hann

Randi Jacobsen

Tá ið tann skuldsetti maðurin varð førdur til grundlógarhoyrið mikudagin, varð væl ansað eftir, at maðurin ikki rýmdi. Hann var í handjørnum, og tveir politistar leiddu hann inn.

Inn komin vóru handjørnini tikin av honum, og hann setti seg niður við síðuna av verja sínum.

Vaktarhaldið var so nógv, at ein politistur alla tíðina stóð undir liðini á tí skuldsetta manninum, tríggir polititistar sótu beint við, og aðrir politistar sótu afturi í rættarsalinum.

Tann skuldsetti sat og skimaðist runt í rættarsalinum og út gjøgnum vindeygað. Tað var stilt sum til eina jarðarferð, meðan bíðað varð eftir fútanum, sum á hesum rættarfundinum var ákæri.

– Nú kemur hon, segði tann skuldsettir.

Maðurin varð skuldsettur fyri drápsroynd, og í øðrum lagi fyri grovan harðskap og harðskap móti tænastumanni, við tað at hann stakk varafútan Finn Ougaard í lærið.

Tann skuldsetti noktaði at hava droynt at drepa, men hann viðgekk at hava stungið við knívi.

## Illur inn á Almannastovuna

Hetta malið snúði seg bara um, at hann ætlaði sær at melda Almannastovuna, men tað bar ikki til. Hann hevði verið bæði hjá politinum, advokatum, í løgtinginum og í Dómhúsinum.

Hann vildi hava uppmerksamheit, segði hann.

Í seinastu viku kom hann til ta niðurstøðu, at einasta loysn var at fara eftir varafútanum, geva honum ein hvøkk og harvið ein møguleika aftrat.

– Tað var ikki persónligt men hevði nakað við hansar arbeiði at gera, segði tann skuldsetti maðurin.

## Reinan knív

Mikudagin ella hósdagin í seinastu viku var hann farin inn í handilin Thomas Dam Búnýti og keypt ein knív.

Knívar átti hann heima, men hann vildi hava ein nýggjan knív at stinga, tí knívurin skuldi vera reinur og ikki gera so nógvan skaða sum ein gamal knívur við nógvum bakterium kundi gera.

## Jagstraði varafútan

Tann skuldsetti maðurin duldi ikki, at hann síðan í seinastu viku hevði gjørt fleiri royndir at koma til Finn Ougaard og stinga hann.

Hann hevði ætlað at gjørt tað í rættarsalinum í seinastu viku, men tá var hann ov seinur. Tí útsetti hann gerðina til hesa vikuna.

Hann hevði tó ein dag verið heima hjá Finn Ougaard, sum kom út at tosa við hann, men tá gjørdi hann einki við tað, tí hann vildi hava áskoðarar.

Tann dagin segði Finn Ougaard honum sjálvur, at hann fór í Norðurlandahusið um kvøldið.

Og har fór tann skuldsetti maðurin eisini. Men hann náddi bara at síggja varafútan koyra avstað. Plássið við Norðurlandahusið hevði annars verið gott, tí har vóru nógv fólk, segði tann 40 ára gamli maðurin.

Allar hesar dagarnar gekk hann við knívinum í lummanum.

Mánadagin var hann farin til húsið, har fútaskrivstovan er. Dyrnar vóru læstar, men Finn Ougaard kom út at tosa við hann og greiddi honum frá, hvar Almannamálaráðið var. Har vóru eingi fólk uttanfyri, so tann skuldsetti valdi ikki at brúka knívin.

## So hendi tað

Men týsdagin skuldi tað verða.

Tá fór hann í Dómhúsið og spurdi eftir Finn Ougaard. Hann fekk at vita, at Finn Ougaard var á fundi inni í húsinum, og hann stillaði seg uttan fyri at bíða.

Við Finn Ougaard segði hann, at nú gjørdi hann seinastu royndina at melda Almannastovuna. Hann svaraði, at tað kundi hann ikki.

Tá so Finn Ougaard vendi sær á og skuldi snara til vinstru, tók hann knívin úr jakkalummanum og stakk Finn Ougaard í vinstra lær.

Hann vildi ikki stinga hann í armin, tí so kundi Finn Ougaard fara undan, og hann hevði tá rakt hann aðrastaðni á kroppinum.

Hann rakti júst har, hann ætlaði at raka, segði hann. Men hann hevði ikki ætlað, at knívurin skuldi fara so langt inn.

Fútin upplýsti í grundlógarhoyrinum, at knívurin, sum hevði 10 cm langt blað, var farin heilt inn til skaftið.

## Kundi eiga knívin

Tann skuldsetti segði, at hann hevði ikki drigið knívin út aftur.

Hann flenti, tá ið hann segði,